# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI VINDMYLLUR Í HÚSAHAGA

Grundin til hesa serstøku byggisamtyktina er, at SEV hevur søkt um, at seta upp 13 vindmyllur av slagnum ENERCON E44/900kW í Húsahaga. Vindmyllurnar eru 45 m høgar við einum veingjabreiði uppá 44 m.

Vindmyllurnar eru staðsettar so mikið langt frá bygdum øki, at óljóð ikki skuldi verið til ampa fyri nærmastu grannar. Frástøðan til nærmasta A1 bústaðarøki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er uml. 1.200 m. Í Heildarætlanini fyri Tórshavnar kommunu frá 2006, har framtíðar býarmenningarøkir eru uppmerkt, er heldur einki øki tættari enn 1.200 m frá myllunum.

Vindmyllurnar skulu ætlandi standa í uppsamlingarøkinum til drekkivatn til bæði Villingadal og Havnardal, tí er tað umráðandi at fáa trygd fyri, at økið ikki verður dálkað, bæði undir uppsetan av myllunum og tá ið myllurnar eru tiknar í nýtslu.

SEV skal gera eina umhvørvisárinsmeting, sum skal góðkennast av Umhvørvisstovuni. Umhvørvisárinsmetingin viðger t.d. trygdarviðurskifti, dálking, ávirkan á landslag, ávirkan á plantu- og djóralív v.m. Eisini skal ein umhvørvisgóðkenning fáast frá Umhvørvisstovuni og loyvi frá øðrum avvarðandi myndugleikum, áðrenn byggiloyvi verður útskrivað.

## § 1. ENDAMÁL

1.1 at skipa økið, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, til uppsetan av vindmyllum.

1.2 at tryggja, at staðsetingin av vindmyllunum verður uppsett eftir eini ávísari skipan

1.3 at tryggja, at bert eitt ávíst slag av vindmyllum verður sett upp á økinum.

1.4 at avmarka ampar av vindmyllum mest møguligt

1.5 at skipa tænastuøkir, tilkoyring til økið og vegir inni á økinum

1.6 at tryggja, at drekkivatn goymslurnar í Havnardali og Villingadali ikki verða dálkaðar

1.6 at tryggja, at ein umhvørvisgóðkenning frá Umhvørvisstovuni fyriliggur

## § 2. HEIMILD OG AVMARKING

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1 og er partar av matr. nr 1175a og 1160a, Tórshavn

2.3 Økið er uml. 410.000 $m^2$ til støddar og liggur í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

2.4 Sambært kap. IV §25 í almennu byggisamtyktini, er 4. grundumráði í høvuðsheitum lagt út til landbúnað og alment frílendi og tílíkt. Tó er eisini loyvt, við eini serstakari byggisamtykt, at gera byggingar, sum eru neyðugar fyri alment gagnligar veitingar og staðseting av aðrari bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Á økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, kunnu 13 vindmyllur setast upp við hartilhoyrandi tænastuøki og koyrivegi sambært kortskjali 2.

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.1 13 vindmyllur av slagnum ENERCON E44/900kW kunnu setast upp sambært kortskjali 2.
4.2 Mest loyvda hædd 67 m.

4.3 Vindmyllurnar skulu setast upp í beinum røðum við eins fjarstøðu ímillum.

## § 5. VEGIR

5.1 Koyrivegir á økinum leggjast í minst 4 m breidd samsvarandi kortskjali 2.

5.2 Samla longd av koyrivegi er uml.2.240 m.

5.3 Um annað virksemi verður í økinum ella vindmylluøkið verður víðkað, skal loyvi gevast til nýtslu av vegunum til slíkt virksemi, eisini hóast talan er um aðrar eigarar. Ásetingarnar í Kap. V, §6, stk. 2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn, um avtøku ella steingjan av vegunum eru galdandi fyri vegirnar, ið eru fevndir at hesi serstøku byggisamtyktini.

5.2 Tænastuøkið til hvørja myllu er uml. 600 $m^2$.

5.3 Samlingarøki til hvørja myllu á 450 $m^2$ skal takast burtur, tá ið myllurnar eru settar upp

## § 6. UMHVØRVISKRØV

6.1 Byggiloyvi er treytað av góðkenning av umhvørvisárinskanning.

6.2 Byggiloyvi er treytað av umhvørvisgoðkenning.

6.3 Trygging skal veitast ímóti dálking í sambandi við bygging og í sambandi við dagliga virksemið.

## § 7. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

7.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

8.1 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

8.2 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.


Norðaripartur
139a
Húsahagi
1175a
Flatnarhagi
1160a
A3
A1
D1
D2
D3
B4
C2
Tórshavnar Kommuna
Plan- og rakstrardeildin
Heiti: Vindmyllir í Húsahaganum
Viðmerking: Yvirlitskort
Skjal nummar: 1
Journal nr: 2013-0578
Dagur: 22.02.2013
Mát:
Tekna:
Rættað:



**Tórshavnar Kommuna**
Byggi- og býarskipanardeildin

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Heiti:** Vindmyllur í Húsahaganum | | | |
| **Viðmerking:** Staðseting og atkoma | | | |
| **Skjal nummar:** 2 | | **Journal nr:** 2013 - 0578 | |
| **Dagur:** 22.02.2013 | **Mát.** | | **Tekna:** MKJ/KF |
| **Rættað:** | | | |

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
100 Tórshavn

27 juni 2013
Mál: 13/00294-8
Tygara skriv:
Málsviðgerð: KHP

**Serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Húsahaga**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13. frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19. frá 18. mars 2013, hevur Tórshavnar kommuna sent Innlendismálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri vindmyllur í Húsahaganum til góðkenningar.

Uppskotið til serstaka byggisamtykt snýr seg um skipan av økinum og treytir fyri bygging á økinum. Økið liggur í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og er uml. 410.000 m2. Ætlanin er at seta 13 vindmyllur av slagnum Enercon E44, sum eru 45m høgar við einum veingjabreiði upp á 44 m.

Sagt verður frá, at Innlendismálaráðið við heimild í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri vindmyllur í Húshaganum.

Víst verður eisini til ætlanarskrivið dagf. 10. juni 2013.

Hjálagt serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Húsahaga við átekning frá Innlendismálaráðnum.

Vegna Innlendismálaráðið

Elsa Østergaard
ráðgevi

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 306800 · faks 306885 · imr@imr.fo · www.imr.fo